Kári Thomsen, umboðsmaður:

# SEV saboterar sólorkuskipan

**Kári Thomsen, umboðsmaður hjá Dansk Solenergi, harmast um, at sólorkuskipanin í Vestmanna skúla enn ikki er liðugt uppsett og er farin at framleiða orku. Hann heldur, at tað er stjórin í SEV, Klæmint Weihe, sum hevur ligið í buktini, tí honum dámar ikki persónin, Kára Thomsen, sum umboðar skipanina í Føroyum**

SEV OG SÓLORKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Eg ivist ikki í, at stjórin í SEV, Klæmint Weihe, hevur saboterað sólorkuskipanina í Vestmanna skúla, tí honum dámar ikki persónin, Kára Thomsen, sigur Kári*

Fyri einum fimm mánaðum síðan fekk Vestmanna kommuna eina nútímans sólorkuskipan heim úr Danmark, sum ætlandi skuldi setast upp og brúkast í Vestmanna skúla.

Talan var um eina íløgu uppá stívliga 240.000 krónur, sum táverandi landsstýrismaður í orkumálum, Eyðun Eltør, var rættiliga positivur yvirfyri. Tí avgjørdi Eyðun, at landskassin skuldi bera helmingin av hesi íløgu.

Tað var danska felagið, Dansk Solenergi, sum seldi sólorkuskipanina til Føroya, og umboðsmaður hjá teimum í Føroyum er Kári Thomsen.

### Framkomin skipan

Kári sigur, at skipanin, talan er um, er ein hin mest framkomna á marknaðinum, har tú hevur sonevndan dataloggara og teldustýrdar skipanir, soleiðis at tú alla tíðina kanst síggja, hvussu stór el-framleiðslan er.

– Ætlanin var, at tú skuldi kunna fara inn á heimasíðuna hjá skúlanum og síggja, hvussu stór el-framleiðslan eitt nú var seinasta mánaðin, seinastu vikuna – ella, hvussu stór framleiðslan er beint nú, sum Kári tekur til.

Hann sigur, at sólorkuskipanin ikki fer at nøkta samlaða el-tørvin hjá Vestmanna skúla, men verður eitt ískoyti, ið svarar til tað, sum eini 4-5 vanlig sethús brúka í streymi.

– Sólorkuskipanin í Vestmanna skúla er ein royndarverkætlan, har tú skal kunna staðfesta, hvussu nógv sólarorka veruliga gevur. Tað serliga við hesi skipan er, at henni ikki nýtist sólarljós fyri at geva orku. Skipanin hevur eitt serligt slag av silicium, sum er eitt grundevni í allari sólorku. Við hesi skipan er dagsljós nóg mikið til orku.

### SEV saboterar

Kári Thomsen harmast um, at skipanin í Vestmanna enn ikki er liðugt uppsett og er farin at framleiða orku.

Hann ivast ikki í, at tað er stjórin í SEV, Klæmint Weihe, sum hevur ligið í buktini, tí honum dámar ikki persónin, Kára Thomsen.

– Eg haldi, at hetta kom ógvuliga týðiliga fram á fundi við Vestmanna kommunu, har eg sjálvur og umboð fyri SEV eisini var við. Tí havi eg boðað frá, at er tað mín persónur, sum stjórin í SEV ikki vil vita av, taki eg meg aftur í verkætlanini, sigur Kári Thomsen.

Vestmanna kommuna:

# Í tøttum samstarvi við SEV

**Hilbert Elisson, tekniskur leiðari hjá Vestmanna kommunu, viðgongur, at kommunan kom í eina ávísa klemmu millum Kára Thomsen og SEV. – Eg eri ikki samdur við Kára, tá ið hesin sigur, at stjórin í SEV hevur saboterað sólorkuætlanina í Vestmanna**

SEV OG SÓLORKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hilbert Elisson sigur, at uppsetingin av sólorkuskipanini til Vestmanna skúla helst verður nakað dýrari, enn kommunan hevði roknað við, men hann vónar kortini, at royndarverkætlanin er komin upp at koyra, áðrenn hetta árið er úti*

Á skrivstovuni hjá Vestmanna kommunu er tað serliga tekniski leiðarin, Hilbert Elisson, sum hevur tikið sær av málinum viðvíkjandi sólorkuskipanini.

Hilbert sigur, at ein partur av sólorkuskipanini er sett upp, men at ein lítil steðgur er í arbeiðinum beint nú.

– Arbeiði gongur sína gongd í tøttum samstarvi við SEV. Hetta er neyðugt, tá ið tað er elfelagið, sum eigur netið og gevur neyðugu loyvini. Skipanin, sum verður sett upp, verður bert eitt ískoyti til el-nýtsluna skúlanum, og tí er neyðugt, at SEV gevur loyvini til íbinding.

Hilbert vísir á, at talan er um eina royndarverkætlan sum í fyrsta lagi hevur til endamáls at vísa, hvat ein slík sólorkuskipan gevur.

Hann sigur, at SEV hevur boðað Vestmanna kommunu frá, at felagið vil loyva, at orkuskipanini verður íbundin netið hjá SEV, men enn eru øll loyvi ikki endaliga komin uppá pláss.

– Vit hava tó fingið at vita, at øll neyðugu loyvini koma uppá pláss, sigur Hilbert.

### Í klemmu

Sum Sosialurin hevur skilt, var ætlanin upprunaliga, at Kári Thomsen, sum umboðar Dansk Solenergi í Føroyum, skuldi hava eftirlitið við uppsetingini av skipanini.

Men hesum hóvaði eftir øllum at døma ikki SEV.

Hilbert Elisson viðgongur, at kommunan kom í eina ávísa klemmu í hesum spurningi, og úrslitið var, at Kári Thomsen tók seg aftur og er nú leysur av verkætlanni.

Tekniski leiðarin hjá Vestmanna kommunu er ikki samdur við Kára Thomsen, tá ið hesin sigur, at stjórin í SEV, Klæmint Weihe, hevur saboterað sólorkuætlanina í Vestmanna.

– Nei, tað haldi eg ikki, vit kunnu geva honum rætt í, sigur Hilbert.

Hann ásannar, at tað er SEV, sum eigur netið og hevur rættindini, og tí er tað eisini el-felagið, sum setir treytirnar.

Hilbert Elisson sigur, at uppsetingin av sólorkuskipanini helst verður nakað dýrari, enn kommunan hevði roknað við, men hann vónar kortini, at skipanini er komin upp at koyra, áðrenn hetta árið er úti.

## Klæmint burturstaddur

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá stjóranum í SEV, Klæmint Weihe, til úttalilsini hjá Kára Thomsen um, at SEV vildi hava Kára burtur úr verkætlanini í Vestmanna.

Stjórin í SEV er burturstaddur í summarfrí.

Vit royndu eisini at fáa fatur á John P. Danielsen hjá SEV, men tað eydnaðist heldur ikki fyri evsta mark hjá blaðnum.

John var ikki at hitta, tá ið vit tosaðu við SEV stutt fyri middag í gjár.

**-v.**



# Bláu lastbilarnir nærkast einskiljing

**Næsta ár skulu fleiri bilar hjá Farmaleiðum hjá Strand-ferðsluni seljast. Tað er størsta hóttanin nakrantíð ímóti útjaðaranum í Føroyum, men landsstýrið vissar um, at korini hjá útjaðaranum mugu ikki versna**

EINSKILJING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Verða Farmaleiðir einskildar, skal tað gerast so at støðan hjá viðskiftafólkunum ikki versnar, sigur Landsstýrið. Her er ein bilur hjá Farmaleiðum á veg í land av Teistanum í Skopun*

Nú er ætlanin at seta skjøtil á arbeiðið at einskilja Farmaleiðir hjá Strandferðsluni.

Farmaleiðir er tann parturin av Strandferðsluni sum hvønn einasta dag stendur fyri flutningi av farmi í tonsatali úr einum parti í landinum til annan, ikki minst til útjaðaran og útjaðaran. Fremsta eyðkenni hjá Farmaleiðum eru teir bláu lastbilarnir, sum dag og dagliga eru at síggja á føroysku vegunum.

Tað er onki yvir at dylja, at serliga fólkaflokkurin hevur havt hug at einskilja Farmaleiðirnar hjá Strandferðsluni og at lata privatum flutningin upp í hendurnar at røkja.

### Ætla at selja bilar

Og nú sær út til, at tað verður veruleiki.

Sosialurin veit, at næsta ár ætlar landsstýrið at selja fleiri bilar hjá farmaleiðum. Vit hava fingið upplýst, at á uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár, hevur landsstýrið roknað við eini inntøku upp á 15 milliónir av at selja bilar hjá Strandferðsluni.

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í samferðslu váttar at ein upphædd stendur á fíggjarlógini. Men fíggjarlógin er ikki heilt liðug enn og hann vil ikki vátta upphæddina. Hann ásannar eisini, at tað hevur verið arbeitt leingi við eini ætlan um at einskilja Farmaleiðir.

Men hann leggur staðiliga afturat, at tað er ongin grund til at stúra, tí hann fer ikki at loypa framav í hesum máli.

- Vit arbeiða við ymsum ætlanum, men vit fara at vera sera varin, áðrenn vit seta nakað í verk, sigur hann.

Hann sigur eisini, at málið um at einskilja Farmaleiðir er ikki endaliga lýst og útgreinað og tað hevur alstóran týdning at gera tað arbeiðið liðugt, áðrenn nøkur støða verður tikin um, hvat skal gerast ella um nakað skal gerast yvirhøvur.

Hann vísir á, at Farmaleiðir eru ein væl upp arbeitt flutningsleið, sum hevur síni viðskiftafólk. Harafturat eru Farmaleiðir samantvinnaðar í einum samanhangandi neti, sum ger, at fiskur og annar farmur smidliga og skjótt kann flytast úr einum enda í landinum í annan,eisini tá ið talan er um heilt smáar nøgdir.

Sostatt hava Farmaleiðir heilt avgerandi týdning fyri einstaklingar og vinnulív kring landið og ikki minst í útjaðaranum og á útoyggj.

- Serliga fyri Fiskavirkini hava Farmaleiðir týdning, tí tað eru virki, sum keypa fisk í einum enda á landinum - og ofta er talan um smáar nøgdir - men so føra Farmaleiðir fiskin til keyparan í einum samantvinnaðum og vælvirkandi samanhangandi flutningsneti, har fiskurin mangan fer ígjøgnum fleiri lið, áðrenn hon er frammi hjá keyparanum.

- Og tað er sera umráðandi, at onki verður gjørt, sum ger støðuna hjá viðskiftafólkunum hjá Farmaleiðum verri, sigur Jógvan við Keldu.

Í hesum sambandi hugsar hann ikki minst um útjaðaran.

- Eitt er at koyra farm runt inni á meginlandinum. Men tænastan til útjaðaran verður ein serlig avbjóðing og tað er sera umráðandi, at umstøðurnar hjá viðskiftafólkunum ikki versna, sigur hann.

Eitt, sum hevur verið frammi, er, at tann parturin av Farmaleiðum, sum eru á meginøkinum, skal einskiljast. Men so at lata Strandferðsluna hava flutningin til útjaðaran eftir fyri at tryggja hann.

Men Jógvan við Keldu leggur dent á, at ongin avgerð er tikin um tað heldur.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, hevur ongar viðmerkingar.



*Emma Petersen hevur ikki hug at halda fram sum borgarstjóri*

## Hovbingar nýggjan borgarstjóra

**Tað er í øllum førum greitt at hovbingar skulu hava nýggjan borgarstjóra eftir kommunuvalið í november**

KOMMUNUVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hovbingar skulu hava nýggjan borgarstjóra.

Emma Petersen, sum er borgarstjóri, sigur, hon hevur gjørt av, at hon verður ikki borgarstjóri eitt valskeið afturat.

Hon hevur ikki tikið støðu til, antin hon stillar upp til bygdaráðsvalið, ella ikki.

Hov er lítil kommna og har er ikki óvanligt, at onkur bara tekur seg saman og ger ein lista, uttan at spyrja valevnini eftir. Tað ber til, tí tað er ein borgara skylda at lata seg stilla upp. Ongin kann sýta at lata seg stilla upp, uttan so at viðkomandi hevur sitið í bý- ella bygdaráð í minst tvey valskeið, ella hevur sjúku at dragast við, ella aðrar, serligar umstøður gera seg galdandi.

Emma Petersen, men hon hevur gjørt upp við seg sjálva, at borgarstjóri verður hon ikki aftur.

Hon sigur stutt og greitt, at hon hevur ikki hug at halda fram sum borgarstjóri.

# Skulu finna sjáldsaman føroyameistara í Vági

**Hetta vikuskiftið verður Johannustevna í Vági og tá verða eisini onkrar sjáldsamar kappingar á skránni**

JOHANNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hetta vikuskiftið kemur gamla vágssluppin, Johanna, aftur til heiður og æru. Hon fyllir 120 ár í ár og hetta vikuskiftið verður skipað fyri Johannustevnu í Vági, har ymisk forvitnislig tiltøk eru á skránni.

Ikki minst eru tvær forvitnisligar kappingar á skránni, har tveir sjáldsamir føroyameistarar skulu finnast.

Hesar kappingarnar verða leygardagin .Tá skulu føroyarmeistarin í at egna og í at bøta slætt, finnast.

Ætlanin er at einir seks mans fara at kappast í at bøta eitt rækjunet, sum fullkomiliga eins hol eru skorin í.

Eisini er ætlanin at seks mans skulu egna eina línu upp á tíð. Egnt verður av klemmu og allir fáa sama húkatal. Tað fer at taka einar 30-45 minuttir at avgreiða báðar kappingarnar.

– Helst eru tað menn í øllum landinum sum eru tiltiknir at egna og bøta. Men tað er á Johannustevnuni leygardagin, at føroyameistararnir skulu finnast, siga fyrireikararnir.

Vinnararnir fáa ávikavist forgyltan húk og forgylta nál, umframt eitt steyp.

### Tónleikur, røður og fyrilestur

Annars vónafyrireikararnir at síggja nógv fólk á Johannustevnu, ikki minst menn, sum hava siglt við og teir eru ikki so fáir. Somuleiðis vóna tey at síggja fólk, sum hava havt tilknýti til grindamábarnar.

Hjá norðoyingum ber til at fara suður við Smyrli úr Havn leygarmorgun 10 og verða í Vági beint eftir døgverða. Tey, sum vilja sleppa umborð á ein av grindabátunum og fara út á Vágsfjørð, skulu bara siga frá á Kunningarstovuni í Vági á telefon 284342.

Annars verður tónleikakafé í Stóra Pakkhúsi fríggjakvøldið frá klokkan 21 - 01, har Neil Joensen og onnur, framføra.

Leygardagin klokkan 13 er ætlanin at bátarnir, sum eru við á Johannustevnuni, skulu koma inn eftir fjørðinum, har grindabátarnir taka ímóti.

Klokkan 15 verða so føroyameistarakappingarnar í at egna og at bøta. Har verður eisini togtogan ímillum manning av Skipasmiðjuni og lærarar í Vági og somuleiðis verður uppboðssøla av seyði.

Øll hesi tiltøkini verða á keiøkinum, beint við uppboðssøluna.

Manningarnar á bátunum, sum eru við, fáa eina máltíð fyri onki klokkan fimm. Klokkan 19 verður konsert í kirkjuni, har grønlendska kórið, Aavaat, fer at syngja.

Klokkan 22 fer Óli Holm at flyta fram røðu á Garðabrúgv og aftaná verður felagssangur við harmoniku og gittari undir Stóra Pakkhúsi.

Og á midnátt spæla Hans Jacob og vinmenn til dans í VB-húsinum.

Sunnudagin klokkan 17 fer Durita Holm at greiða frá siglingini kring knøttin við Salku Valku í Stóra pakhúsið, har eisini sjósavnið er opið til klokkan 20.



*Johanna er í miðdeplinum á stevnu í Vági hetta vikuskiftið, har onkrar sjáldsamar kappingar eisini eru á skránni*